## VIÐMERKINGAR

# Jógvan við Keldu fremur grovt álop á føroyska samleikan!

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*




Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, boðar frá ræð-andi ætlanum um broytingar í navnalóggávuni.

**Lóggeving við afturvirkandi kraft.**
Eg trúði ikki mínum egnu oyrum tá eg hoyrdi landsstýrismannin í innlendismálum greiða frá ætlaðu broytingunum í navna-lógini. Ætlar at broyta navnalóggávuna við afturvirkandi kraft til 1992? Og skal aftur geva loyvi til øll nøvn, óansæð um tey hava nakað við føroyskt mál at gera yvurhøvir, bara onkur í familjuni hevur borið hetta navn fyri 100 árum síðani.

Hvørja virðing hevur landsstýrismaðurin fyri lógum og løgtingum sum hava sitið undan honum? Hvørja virðing hevur landsstýrismaðurin fyri tí sum er samtykt undan honum? Og hvørja virðing hevur hann fyri fólkaræðisligum reglum?

At lóggeva við afturvirkandi kraft er og verður altíð ein ósiður og eitt afturstig fyri fólkaræðið. Hetta eigur ikki at kunna lata seg gera. Eisini kunnu vit stúra fyri hvat vit kunnu vænta frá landsstýrismanninum næstu ferð.

Kunnu vit kenna okkum trygg í einum landi har landsstýrismaðurin í innlendismálum boðar frá lógum sum koma at virka við afturvirkandi kraft?

Eftir mínum tykki nei, og tí vil eg seta fram hendan spurning á føroya løgtingi sum skjótast. Er tað veruliga so, at ABC samgongan er so sterk, at hon kann sammetast við einaræði og óansæð hvat ein minniluti heldur, so skulu sjálvt fólkaræðisligar mannagongdir skúgvast til viks? Tað skal vera mín inniliga vón at so er ikki.

**Máar støði undan føroyskum máli og samleika**
Ein annar týðandi spurningur, í sambandið við at gera broytingar í navnalóggávuni er, at ein partur av samleikanum hjá føroyska fólkinum liggur í nøvnunum og navngevingini.

Við nýggju navnalóggávuni frá 1992 og seinni broytingum, sum vóru gjørdar í 2002, hevur politiski myndugleikin ásannað, at neyðugt var at rudda upp og beina teir skeivleikar, sum høvdu sníkt seg inn í málið, á beint aftur.

Men við at gera seg inn á málið og føroyska navngeving nú, máar landsstýrismaðurin støði undan okkara samleika, og tí sum í framtíðini kann verða eitt kjølfesti í føroyskari mentan, sum uppvaksandi ættarlig skulu byggja á, og brynja tey til at kenna seg sjálvi og sínar røtur, í einum heimi sum so skjótt og ógvusliga broytist, ávirkar, ørkymlar og krevur, so tey uttan tryggar og góðar karmar um sín samleika, lættliga kunnu takast av fótum.

So spurningur verður reistur á føroya løgtingi, og eg vóni at vit kunnu fáa eitt virðiligt orðaskifti um hesi viðurskifti, tí sjálvsagt skal bera til at skifta orð um broytingar, sum eru væl grundaðar, men kravið er at broytingarnar eru í samsvarið við føroyska málið. At gera tað við afturvirkandi kraft, vóni eg ikki fer at bera til í einum fólkaræðisligum landið.

# Hvar er opna stríðið, Heini í Skorini

**Finnur Helmsdal**
*løgtingsmaður*




Blaðmaðurin Heini í Skorini viðgjørdi í hóskvøldsblaðnum hjá Sosialinum ein fyrispurning frá undirritaða til Hans Paula Strøm. Fyrispurningurin snúði seg um viðurskiftini hjá fyritíðarpensionistum.

Tað er bæði stuttligt og gleðiligt, at blaðmaðurin tekur slíkan tátt upp, tí tað man annars vera sum lundi á jólanátt, at okkara blaðfólk geva sær stundir til slíkt. Tað var tí eisini ein sjálvfylgja, at ein gav sær stundir at greiða blaðmanninum frá tí, málið snúði seg um.

Greinini - ella kanska rættari innihaldinum bagdi heldur einki. Blaðmaðurin skrivaði bæði frá undirritaða og landsstýrismanninum, júst sum slíkt skal gerast.

Tí var tað nokk so hugtungt at síggja yvirskriftina, blaðmaðurin hevði givið greinini. Opið stríð um pensionsveitingar. Um tað var tilvitað, veit undirritaði ikki, men tað eydnaðist til fulnar blaðmanninum at venda fokus frá sera viðkomandi og týdningarmikla innihaldinum til persónarnar, sum hava verið blandaðir í upp í nevnda fyrispurning.

Fyrispurningurin varð svaraður av landsstýrismanninum í tinginum mikudagin, og hóast menn ikki vóru fult samdir, so var ikki minsta tekin um nakað sum helst stríð. Spurningurin fekk eina góða og skikkaða viðgerð, og snúði ósemjan bara um allar minsta partin av fyrispurninginum. Annars vóru undirritaði, landsstýrismaðurin og Kristian Magnussen so at siga fult samdir. Samdir um, at tað er tvingandi neyðugt at endurskoða pensiónslógirnar og at fremja ávísar ábøtur og broytingar. Veit ikki hvørjum blaðmaðurin heldur yvirskriftin tænit. Kanska søluni, kanska tað, at hann aftur nú fær sett tjóðveldismann í samband við orðið stríð. Men eg skal heilsa og siga, at yvirskiriftin á ongan hátt tænir søk pensionistanna. Og eg ivist ikki eina løtu í, at landsstýrismaðurin er meira enn samdur við undirritaða í hesum.

Fari at heita á blaðmannin um fram haldandi at taka slík mál upp, men at gera tað við bata fyri eyga og ikki nøkrum øðrum keðiligum, sum eg ikki skal nevna her.

# Valstríðið flytur mørk og kritar vøllin upp

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins*




Í valstríðnum hevur nógv verið kjakað um komandi ESgrundlógina, og hvat fer at henda við føroyskum uttanríkispolitikki, nú danir fara at avgeva sín uttanríkispolitikk til Brúsell at umsita. Uttanríkismál er felags málsøki. Onkur hevur hildið uppá, at vit kunnu ikki yvirtaka hetta, tí talan er um málsøki, sum er knýtt at fullveldinum, meðan onnur hava sagt, at forðingin liggur í donsku grundlógini.

Men nú tykist vend verða komin í.

Einasti politiski flokkur í Føroyum, sum framvegis heldur uppá, at uttanríkismál skulu umsitast uttan fyri Føroyar, er Sambandsflokkurin. Hjá teimum er tað líka mikið um ræðisrætturin og umsitingin av hesum málsøki er niðri á Christiansborg ella niðri í Brúsell, - bara hetta ikki fer fram í Føroyum, so er í lagi! Hesin hugburður er so niðursetandi, at ongin annar enn Sambandsflokkurin vil kennast við hann, - longur. Tíbetur! Og tað hava hinir flokkarnir eisini innsæð nú. Tí tykist tað, sum at rættiliga stórur partur av valevnunum í hesum valstríði eru samd um, at uttanríkismál mugu yvirtakast. Í so máta hevur valstríðið flutt mørk og kritað vøllin upp.

Verður Tjóðveldisflokkurin afturvaldur á Danating, fer hann at kanna við serkønari hjálp og upplýsa, um avleiðingarnar fyri Føroyar, nú alt bendir á, at nýggja ES-grundlógini eisini fer at fáa gildi fyri Danmark. Hetta ger Tjóðveldisflokkurin:

- í fyrstu atløgu fyri at vissa okkum um, at ongi stig verða tikin, sum kunnu binda okkum fastari
- í aðru atløgu fyri at prógva, hvussu fløkjaslig og tilvildarlig støða Føroya er í einum eindarríki, og
- í triðja lagi fyri at hava so gott grundarlag at diskutera og viðgera støðu Føroya í mun til Europeiska Samveldið

Við hollari vitan ert tú før fyri at upplýsa um fakta og megnar at skapa virðing fyri tínum politisku holdningum og tjóðskaparligu kenslum.

# Valskipanir í Norðurlondum

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Norrøna Felagnum*

Hvussu rokna tey, tá val eru til tingini í Norðurlondum, eitt nú fólkatingið, sum skal mannast av nýggjum í næstu viku?

Mikukvøldið 2.februar kl.19.30 heldur Petur Zachariassen, hagfrøðingur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, almennan fyrilestur um Valskipanir í Norðurlondum, útrokningarhættir til lóggávutingini í Norðurlondum, eyðkenni, líkleikar og munir, nútíð og søga. Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri.

Norðurlond hava í øldir - bæði politiskt og mentanarliga - havt eina samantvunna søgu. Menningin av fólkaræðisligum stovnum og tilhoyrandi valskipanum í londunum hava nógv felags eyðkenni, eitt nú viðvíkjandi valrætti, valleisti, útrokningarhátti og býti á valdømum. Men ymsar umstøður og politiskar fyritreytir hava eisini givið munir og frábrigdi í teimum norðurlendsku valskipanunum, eitt nú við ásetan av tinggátt, og hvussu eykavaldir tinglimir verða brúktir.

Í fyrilestrinum verður greitt frá útrokningarhættunum til at manna lóggávutingini í Norðurlondum. Komið verður inn á hvussu tingmannabýtið verður funnið út frá atkvøðubýtinum, hvussu londini hava skipað seg við valdømum, tinggáttum, eykavaldum og øðrum viðurskiftum, sum hava týdning í eini valskipan. Skiftandi valskipanir seinastu góðu hundrað árini verða lýstar í stuttum.

Fyrilesturin verður í Norðurlandahúsinum 2. februar kl.19.30, og hann er almennur.